**Fíggjarmálaráðið**

## Ársroknskapirnir hjá kommununum fyri 2009

Sambært kommunustýrislógini skulu kommunustýrini hava samtykt og sent til landsstýrið ársroknskapin fyri undanfarna ár innan 1. juni. Fíggjarmálaráðið hevur samantalt ársroknskapirnar 2009, og og verður her tikið samanum fíggjarligu heildargongdina hjá føroysku kommununum í 2009. Fíggjarmálaráðið hevur ikki gjøgnumgingið einstøku roknskapirnar í mun til játtanareftirlit ella í mun til lógarkrøv annars, men eru tølini niðanfyri tikin beint úr ársroknskapunum.

Í talvuni niðanfyri sæst samantalt úrslit fyri føroysku kommunurnar:

***Ársroknskapur 2008 og 2009 umframt fíggjarætlan 2010 hjá kommununum samantalt***

| | (tús. kr.) | **2008** | **2009** | ***%-broyting*** | **2010FÆ** | ***%-broyting*** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1-7 | Rakstur, netto | 1.085.068 | 1.067.467 | *(-1,6%)* | 1.043.425 | *(-2,3%)* |
| | Løgur, netto | 615.650 | 380.721 | *(-38,2%)* | 331.643 | *(-12,9%)* |
| § 20 | Rentur, netto | 30.911 | 44.654 | *(+44,5%)* | 55.828 | *(+25,0%)* |
| | Skattur v.m. | 1.396.738 | 1.324.169 | *(-5,2%)* | 1.337.509 | *(+1,0%)* |
| | **RLÚ-úrslit (undirskot)** | **-334.890** | **-168.673** | ***(-49,6%)*** | **-93.387** | ***(-44,6%)*** |

*Viðm.: "Rakstur, netto" er rakstrarútreiðslur minus rakstrarinntøkur. Samsvarandi er við "´Løgur, netto" og "Rentur, netto". "Skattur v.m." er kommunuskattur plus felagsskattur minus rentustuðul.*

Til samanberingar er í talvuni eisini sett samantald roknskapartøl fyri 2008 og fíggjarætlanartøl (uttan møguligar eykajáttanir) fyri 2010, umframt prosentbroytingar í mun til árið frammanundan.

Sum sæst er fall í rakstri, løgum og skatti, meðan rentuútreiðslurnar vaksa. Tilsamans ger hetta, at undirskotið í 2009 er 169 mió. kr, fyri kommunurnar tikið undir einum. Hetta er ein munandi minking í mun til árið frammanundan, ið tó var eitt serligt ár vegna serstakliga stórar kommunalar løgur tað árið. Hetta sæst aftur í fallinum í løgunum í 2009, har samlaða støðið fyri kommunalu íløgunum fall í mun til árið fyri, men tó kortini var á hampuliga høgum støði, søguliga sæð.

Í mun til skuld eru føroysku kommunurnar rættuliga ymiskt fyri, og av tí at avmarkingar eru fyri hvat kommunur við omanfyri eina álíkning í skuld kunnu gera, er undirskotið náttúrliga savnað hjá kommunum, ið hava møguleika at hava undirskot og harvið vaksa um sína skuld. Størstu undirskotini í 2009 hava sostatt verið hjá kommunum við relativt lágari skuld, sí talvuna niðanfyri:

Traðagøta 39 • Postsmoga 2039 • 165 Argir

Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo

**Størstu kommunalu undirskotini í 2009**

| *(tús. kr.)* | RLÚ-úrslit (undirskot) | Nettoskuld við ársenda | Nettoskuld per íbúgva |
|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna | -121.225 | -58.801 | -3,0 |
| *excl. Tórshavnar havn* | *-144.273* | *18.827* | *1,0* |
| Kvívíkar kommuna | -14.812 | 10.709 | 17,7 |
| Vága kommuna | -12.509 | 12.348 | 6,4 |
| Eysturkommuna | -7.950 | 27.972 | 14,3 |
| Sjóvar kommuna | -5.489 | 12.647 | 12,6 |
| Fuglafjarðar kommuna | -5.233 | 46.583 | 30,0 |

*Viðm.: Av tí at Tórshavnar havn í 2009 legði fram fram serstakan roknskap, er Tórshavnar kommuna víst við og uttan Tórshavnar havn.*

Kommunurnar við undirskoti hava sum sæst havt pláss í mun til lógarmarkið at hava undirskot, tó so at Fuglafjarðar kommuna við úrslitinum í 2009 er komið upp at markinum á eina álíkning. Harafturat eru Kvívíkar, Vága, Eystur- og Sjóvar kommunur í gongd við somikið stórar verkætlanir í 2010, at tá hetta árið er farið, kann roknast við at hesar eisini eru farnar upp ímóti eina álíkning í skuld. Stóru ígongdverandi og ætlaðar verkætlanirnar hjá Tórshavnar kommunu merkja, at hon kann væntast at koma uppat álíkningarmarkinum um nøkur ár.

Í samband við, at nakrar av skuldarbundnu kommununum komu í fíggjarligar trupulleikar í 2008 setti Fíggjarmálaráðið treytir til fíggjarstýringina í Klaksvíkar, Tvøroyar og Sands kommunum. Nú 2009 er farið um bak, kann staðfestast, at hesar kommunur hava fingið fíggjarliga góð úrslit í árinum. Tyngsta takið at koma aftur undir álíkningina í skuld var sostatt tikið hjá Klaksvíkar og Tvøroyrar kommunum í 2009. TSands kommuna er tó enn er í so stórari skuld, at tað fer at taka tíð at koma niður á normalt skuldarstøði.

Tær mest skuldarbundnu kommunurnar hava generelt brúkt árið at minka um skuld, sí talvuna niðanfyri:

**Størstu kommunalu yvirskotini í 2009**

| *(tús. kr.)* | RLÚ-úrslit (yvirskot) | Nettoskuld við ársenda | Nettoskuld per íbúgva við ársenda |
|---|---|---|---|
| Klaksvíkar kommuna | 12.360 | 145.783 | 29,7 |
| Tvøroyrar kommuna | 5.938 | 46.784 | 26,4 |
| Vágs kommuna | 5.396 | 28.187 | 20,1 |
| Sunda kommuna | 4.299 | 52.529 | 31,9 |
| Sands kommuna | 2.841 | 21.619 | 37,1 |
| Runavíkar kommuna | 2.635 | 108.965 | 28,7 |

*viðm.: Tøl sambært innkomnum roknskapum*

Vágs kommuna er sum sæst í talvuni ikki í serliga høgari skuld í løtuni, men hevur kommunan tó átikið sær stórar løguútreiðslur til ellisheim, og ger hetta, at skuldin fer at vaksa nógv í 2010 og 2011. Viðmerkjast kann, at Runavíkar kommuna kom undir álíkningina tíðliga í 2010, meðan Sunda kommuna eftir fíggjarætlanini kann væntast at koma undir álíkningina við ársenda 2010.

Yvirskipað verður mett rætt at raðfesta skuldarminking hjá tungt skuldarbundnum kommunum fyri at kunna vissa borgaran um at kommunala tænastustøðið ikki í longri tíð fer undir minstatørvin, eins og í 90-árunum, og fer tí at verða hildið fast um politikkin um at skuldarbundnar kommunur skulu raðfesta at minka um skuld. Millum annað treytirnar til

omanfyrinevndu tríggjar kommunur verða tí verandi, og skulu skuldarbundnar kommunur raðfesta skuldarminking.

**Størri almennur opinleiki í kommunalu roknskapar- og játtanarviðurskiftunum frá 2011**

Roknskaparverkið hjá flestu kommunum var umlagt í 2009, meðan Tórshavnar, Sands og Skopunar kommunur løgdu um roknskaparverk í 2010. Umleggingin merkir millum annað, at kommunurnar regluliga rapportera mánaðarlig fíggjartøl til eina felag roknskaparskipan hjá Fíggjarmálaráðnum.

Ætlanin er at opna skipanina fyri almenningum í 2011, so at fjølmiðlar og onnur áhugað kunna fáa regluliga dagførd tøl fyri land og kommunur á einum stað. Fíggjarmálaráðið fer at veita skeiðir til áhugaðir fjølmiðlar á heysti 2010.

**Kommunur omanfyri álíkningini í skuld eru per 1. august 2010:**

- Klaksvíkar kommuna,
- Nes kommuna,
- Eiðis kommuna,
- Sunda kommuna,
- Vestmanna kommuna,
- Sands kommuna,
- Skopunar kommuna, og
- Tvøroyrar kommuna

Harafturat hevur Vágs kommuna átikið sær løguútreiðslur, ið gera hon fer at koma uppum álíkningarmarkið.

Eftir fíggjarætlanum kann væntast, at Sunda, Nes og Tvøroyrar kommunur koma undir álíkningarmarkið við ársenda.